# Kiri krøv

**Heimsstjørnur eru ikki at spæla við**

LISTASTEVNAN
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Dýrasta atgongumerki á ársins Listastevnu kostar 950 kr. Men tað eigur at vera eitt hóskandi lutfall millum prís og góðsku. Tí Kiri Te Kanawa er ikki hvør sum helst. Ert tú ikki ein av teimum mongu stuðlunum, skalt tú rinda hesar góðu 950 krónur fyri at hoyra hennara rødd. Og tað hava longu nógv gjørt.

Men hon er ikki heimsstjørna fyri einki. Krøvini til fyrireikararnar eru nevniliga sera stór. Upprunaliga skuldi Kiri Te Kanawa steðga í eina viku, men steðgurin er styttur nakað. Hennara umboðsmaður hevur verið í Føroyum og góðkent umstøðurnar.

Heimsstjørnan Kiri Te Kanawa er ómetaliga ansin, og krevur tær allarbestu umstøðurnar

Frá tí hon kemur til landið, skal hon hava góðar bilar eftir sær - Mercedez ella líknandi. Og hon skal hava alt at vita um frástøður og ferðing og annað. Ikki ber til at skipa fyri útferðum við henni - tað er nakað, hon avgerð, tá hon kemur til landið. Allar avtalur skulu vera gjørdar, áðrenn hon kemur. Alt skal byrja rættstundis, og hon skal allatíðina hava atgongd til mat og tær bestu umstøðurnar at hvíla seg.

Ein vøddamýkjari skal vera tøkur, um henni tørvar tað. Alt hetta ger hon fyri, at einki skal koma í vegin fyri, at røddin megnar konsertina.

Oddvá Nattestad, samskipari, sigur, at tað ikki er nakar trupulleiki hjá Listastevnuni at eftirlíka krøvnini, men tað er sjálvandi ein avbjóðing.

- Vit hava somikið góð fólk og góðar umstøður í Norðurlandahúsinum, at tað ber til, sigur Oddvá, sum væntar eina rimmar konsert.

## Heimsnavn

À konsertini 7. august fer Kiri Te Kanawa at syngja millum annað Mozart. Men Kiri Te Kanawa hevur heilt nógv at bjóða - eisini meira modernaðan sang.

Fyrireikarnir siga, at hon er helst kendasta listafólk, ið nakrantíð hevur verið vitjað í Føroyum. Hon er millum tey allarbestu í heim-inum, og hon hevur framført á øllum teimum heimsgitnu pallunum kring heimin.

## Ikki fyri einki

Kundi tú kanska hugsað tær, at fingið Kiri Te Kanawa at sungið fyri tær. Ella situr tú kanska og ivast í, um hon veruliga er so góð, sum tey klóku siga. Tað verður í øllum førum ein rættiliga kostnaðarmikil roynd. Tí Kiri Te Kanawa fær 700.000 krónur fyri ómakin í Føroyum. Enn ein staðfesting av, at hon er ein heimsstjørna.






*Kartni Ravnsfjall, formaður fyri Listastevnuni, saman við Jan Christiansen, borgarstjóra í Havn, og Oddvu Nattestad, samskipara. Listastevnan lovar listaligarliga góðsku og fjøllbroytni á ársins stevnu.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

# Stór, størri, enn størri, nógv størri

**Listastevnan stílar enn hægri í ár enn undanfarin ár. Fyrireikararnir eru ikki eina løtu í iva um, at gongdin seinastu árini hevur verið so jalig, at tað kann ikki annað enn hepnast væl í ár**

LISTASTEVNAN
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Við eini fíggjarætlan, sum javnvigar einastaðni millum 2,5 og 3 milliónir krónur, er Listastevnan nógv tað størsta mentanartiltaki í Føroyum. Stevnan verður í ár hildin 6. til 15. august.

Mánadagin bjóðaðu fyrireikararnir miðlum og stuðlum til eina samkomu, har fyrireikarnir kundu siga frá, hvat stevnan fer at innihalda í ár.

Og fyrireikararnir eru ikki eina løtu í iva um, at stevnan hevur bestu útlit at gerast frálík. Tær seinastu tríggjar, sum eisini eru tríggjar tær fyrstu, listastevnurnar hava víst ein greiðan positivan tendens, og fyrireikarnir halda seg hava fingið so mikið nógv gott í beinið, at forsøgnin fyri august ber boð um ein mentanarhákonjuktur.

## Einki tema

Undanfarin ár hevur Listastevnan havt eitt ávíst tema, eitt nú sjónleikur var eitt árið tema. Men í ár er einki tema sum so. Lyklaorðið hjá fyrireikarunum er góðsku. Ikki kend nøvn, ikki uppruni, men góðska, leggja fyrireikarnir eina við.

Heiðursforsetin Sunleif Rasmussen er borganin fyri, at góðskan er í lagi. Hann skal minna fyrireikarnar á listarliga stevnumiðið.

Oddvá Nattestad, samskipari, sigur, at arbeiðið at fáa fatur á góðum listafólkum til stevnuna er vorðið munandi lættari við árunum.

- Nú koma nógv fleiri fólk til okkara. Vit hava fingið eina rúgvu av ómetaliga góðum og týðandi kontaktum úti í heimi. Samstundis hava onnur fingið eyguni upp fyri okkum, og vit merkja, at áhugin gevur bæði okkum og føroyskum listafólkum góðar møguleikar, sigur Oddvá Nattestad.

## Gloypibitar

Skráin er sum vera man rættiliga drúgv og umfatandi. Skulu vit kaga eitt sindur eftir, hvørjir listarligirgloypibitar eru at fáa eyga á.

Høvuðsnøvnin eru Kiri Te Kanawa og Jethro Tull. Kiri Te Kanawa verður umrødd aðrastaðni, og Jethro Tull konsertin er væl og virðiliga útseld.

Allarhelst fremstu føroysku sangararnir í løtuni, Teitur Lassen, og Eivør Pállsdóttir hava eisini trokað seg millum fremstu síðurnar í lýsingartilfarinum fyri Listastevnuna. Teitur fer at spæla fyri fólki fríggjadagin 13. august saman við tveimum tónleikarum. Eivør Pállsdóttir fer at framføra í einari írsk/íslendskari/føroyskari konsert. Hendan konsertin verður sunnudagin 15. august.

Ìrskt er aftur á skránni við Celtic Tenors 6. august.

Í fjør vitjaði kendi bretski rithøvundurin, Fay Weldon, og í ár verður tað Jostein Gaarder, sum kanska er best kendur fyri bók sína Sofies Verden.

Umframt hesi tiltøk vera eisini hópin av øðrum tiltøkum, sum vit fara at skriva meira um í næstum.

## Sjálvironi

Tá tankin um Listastevnuni í sínari tíð kom alment fram, var tað millum annað við teirri grundgeving, at ein stór stevna skuldi avloysa millum annað Jazz- og gospelfestivalin. Hugsað varð, at við peninginum savnaðum á einum staði, so vildi tankin um veruliga stór heimsnøvn gerast alsamt meira realistiskur. Til æru fyri hendan dreym og tíðindafólkum bjóðaði Oddvá Nattestad Pavarotti vælkomnum. Men Pavarotti er ikki komin enn, og tað var heldur ongantíð meiningin, at hann skuldi koma. Men leysasøgurnar um Pavarotti hava ikki lagt seg fyri tí, og Oddvá Nattestad hevur eftir drúgva leitan fingið fatur á tí sokallaða manageranum hjá Pavarotti, og á samkomuni mánadagin kundi hon við einum breiðum smíli greiða frá.

Tíanverri fyri Listastevnuna og øll onnur ætlar Pavarotti sær ikki at koma til Føroya. Men fært tú ikki tann tú elskar, so kunnu føroyingar møguliga komandi ár elska ein annan nógv meira. Tí José Carreras sigst at vera áhugaður at leggja leiðina til Føroya. Eins og Pavarotti er hann partur av teimum trimum tenorunum. Tað er ein annar manager - tann hjá Kiri Te Kanawa, sum er komin við hugskotinum, og eftir øllum at døma er tað ikki bert ein fjarskotin tanki.





*Seks ára gamli Róar Túná Rúnarsson av Tvøroyri var við Johonnu undir Sumbiarbjørgunum um vikuskiftið. Sunnudagin verður Johanna aftur karmurin um eitt forvitnisligt tiltak*

# Teilendskur dagur umborð á Johonnu

**Sunnudagin verður skipað fyri einum heilt serligum tiltaki umborð á sluppini Johonnu**

FERÐAVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað skerst ikki burtur, at gamla vágssluppin, Johanna, er góður fongur hjá ferðavinnuni í Suðuroy.

Og sunnudagin verður hon aftur miðdepilin fyri einum heiltserligum tiltaki.

Tá skipar ferðavinnan í Suðuroy fyri teilendskum grill-degi umborð á Johonnu.

Hetta tiltakið er lagt soleiðis, at tað skal bera til hjá fólki norðanfjørðs at vera við.

Johanna siglir av gomlu kaj á Tvøroyri sunnudagin kl. 13.00 og tá setir hon kós ímóti Tjaldavík, sum er inni á Trongisvágsfirði, so ongum nýtist at stúra fyri sjóverki.

Sluppin fer at leggja seg innast í víkini, ímillum Tjaldavíkshólm og mølina.

Tjaldavík er fornur staður, tí her settu menn tjald upp, tá teir skuldu á suðuroyarting »Uppi millum stovur« í Øravík.

Umborð á Johonnu verður borðreitt við teilendskum mati og eitt nú verður kynt uppundir grilluna.

Ferðin kostar 200 krónur fyri vaksin og 50 krónur fyri børn.

Fyri hendan peningin kunnu fólk eta so nógv tey orka.

Enn er tað eitt dulsmál, hvat er á matarseðlinum men maturin skal verða lagaður til tann føroyska góman.

Saft verður at drekka afturvið, so tey, sum vilja hava okkurt annað afturvið, eru vælkomin at hava tað við sjálvi.

Johanna verður aftur á Tvøroyri kl. 17.00, so tey sum skulu norður við Smyrli kl. 17.30, sleppa við.

Tað er eitt avmarkað tal av fólki, sum sleppur við hendan túrin.

## Ganga úr Fámjin til Hovs

Leygardagin verður eisini skipað fyri gongutúri úr Fámjin til Hovs.

Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Vági kl. 10.00 og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30 til Fámjins.

Gingið verður eftir varðagøtuni allan vegin til Hovs. Fyrst um Fámjinsskarð og síðani Mannaskarð. Farið verður eystanfyri Laganfelli og heimeftir Brekkum og at enda um Mýrugilið og oman til Hovs.

Staðkend frásøgufólk eru við á túrinum.

Eftir loknan gongutúr verður koyrt við bussi úr Hovi til Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági. Kostnaður fyri gongutúrin og busskoyring er kr. 100,- fyri vaksin men fyri børn er tað ókeypis.

Bindandi tilmelding til bæði tiltøkini skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/ 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/ 284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00

**GSM telefonir**
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
**Tráðleysar**
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
**Til skip og bátar**
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
Storno
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

Sosialurin
www.sosialurin.fo



Tær tykir at lívið er keðiligt – grátt,
Hvønn er tað tú saknar – hví falla í fátt?
*(T.M. Smith)*

LOYSNIR 32 21 23

**"KOM SUÐOR — TAÐ ER NOGV NOGV LETTARE"**

Kunningarstovan í Vági tel 374342 / 284342, Kunningarstovan á Tvøroyri tel 372480 / 284480,
Frítíðarhúsini í Lopra tel 374342, Hotel Bakkin tel 373961, Hotel Øravík tel 371302,
Hotel Tvøroyri tel 371171, Gistingarhúsið undir Heygnum tel 372046